# Dømd at verða neyðtikin



*Pakistanska gentan, ið var bólkaneyðtikin sæst her saman við mammu síni uttan fyri heimið í Meerwala Jatoi nærindis Multan mikudagin. – Eg nam við føtur teirra. Eg græt. Eg segði við teir, at eg lærdi børnini í bygdini tað, sum stendur í Koranini, og at teir tí ikki máttu revsa meg fyri nakað, sum eg ikki hevði gjørt. Men teir skræddu klæðini av mær og neyðtóku meg – ein fyri og annar eftir, greiddi hon pakistanska blaðnum, The Dawn, frá*

*Mynd reuter*

**Yngri bróður hennara var vorðin væl við eina gentu úr Mastoiættarbólkinum. Tí avgjørdi ráðið í bygdini, at tann 18 ára gamla gentan skuldi neyðtakast - av fýra monnum**

BAKGRUND
*Árni Joensen*

Leygardagin tann 22. juni varnaðust nakrir limir í ráðnum í pakistansku bygdini Meerwala í landslutinum Punjab, at ein ellivu ára gamal drongur hevði »ólógligt« samband við eina kvinnu úr teirra ættarbólki. Brotið hjá tí unga dronginum var, at hann hevði gingið undir liðini á einari 30 ára gamlari kvinnu eftir vegnum. Sum revsing varð drongurin læstur inni, og tá hann hótti við at siga løgregluni frá, hvat honum hevði verið fyri, varð hann kynsliga misnýttur. Tveir tímar seinni samtykti ráðið í bygdini, at ein 18 ára gomul systir hjá tí ellivu ára gamla dronginum skuldi neyðtakast. Hetta skuldi vera hevnd fyri brotið hjá beiggjanum.

Pápin royndi sum vera man at verja børnini. Hann greiddi ráðnum í bygdini frá, at tann ellivu ára gamli drongurin var ov ungur til at hava kynsligt samband við nakran, og at kvinnan tí var trygg.

Men einki hjálpti. Meðan fleiri hundrað fólk hugdu at, neyðtóku fýra menn ta 18 ára gomlu gentuna seinni sama dag, soleiðis sum ráðið hevði samtykt, skrivar pakistanska blaðið The Dawn.

## Gekk nakin til hús

Tann 18 ára gamla Mukhtaran Bibi hevur sjálv greitt blaðnum frá tilburðinum:

– Eg nam við føtur teirra. Eg græt. Eg segði við teir, at eg lærdi børnini í bygdini tað, sum stendur í Koranini, og at teir tí ikki máttu revsa meg fyri nakað, sum eg ikki hevði gjørt. Men teir skræddu klæðini av mær og neyðtóku meg – ein fyri og annar eftir.

Sambært The Dawn var ein av neyðtøkumonnunum bróður ta 30 ára gomlu kvinnuna, sum tann ellivu ára gamli drongurin var sæddur saman við.

Mannarættindafelagsskapurin The Joint Commitee for Peace sigur, at tann 18 ára gamla gentan varð noydd at ganga nakin heim til hús aftan á neyðtøkuna, meðan næstan túsund fólk eygleiddu hana. Felagsskapurin hevur nú kravt, at teir pakistansku myndugleikarnir taka valdið frá ráðunum í bygdunum í Punjab-landslutinum.

## Fyri rættin

Hesaferð hava myndugleikarnir eisini gjørt vart við seg. Løgreglan fekk boð um at taka øll vápn frá Mastoi-ættarfólkinum og at handtaka neyðtøkumenninar og limirnar í ráðnum, sum gav boð um neyðtøkuna. Níggju menn sita nú í varðhaldi, men teir siga seg einki vita um tilburðin og halda uppá, at teir eru als ikki úr Meerwala, men úr einari aðrari bygd.

Samstundis hava myndugleikarnir flutt allar løgreglumenninar, sum arbeiddu í Meerwala, til aðrar bygdir at arbeiða, og nú verður kannað, um teir kunnu revsast fyri ósketni í tænastuni. Samstundis verður kravt, at teir fýra neyðtøkumenninir og teir fimm limirnir í ráðnum í Meerwala verða settir fyri hægstarætt í býnum Lahore, tí hildið verður, at teir kunnu ávirka úrslitið, kemur málið fyri ein rætt í Muzaffargarh-økinum, har Meerwala er.

Eisini hetta tykist hava havt ávirkan á myndugleikarnar, tí blaðið The News skrivar, at teir níggju menninir skulu fyri ein serligan yvirgangsdómstól. Tað hevur løgmálaráðharrin í Punjab-landslutinum givið boð um, skrivar blaðið.

## Ikki einasti tilburðurin

Blaðið The Dawn vil vera við, at Rana Ijaz Ahmed Khan, løgmálaráðharri er vorðin kunnaður um, at tilburðurin í Meerwala tann 22. juni er minni enn so tann einasti av hesum slagnum har á leiðini.

M. a. er komið fram, at tá menn fyri trimum árum síðani gjørdust ósamdir um eina vatnveiting, burturfluttu nakrir teirra tvær systrar og neyðtóku tær. Tær vóru døtur ein mann, sum hevði eina aðra áskoðan um vatnveitingina. Í einum øðrum føri varð ein genta burturflutt og seld. Eisini er komið undan kavi, at ein ung genta í einari bygd tætt við Meerwala tók lívið av sær herfyri, eftir at tveir menn høvdu neyðtikið hana.

Tað hevur leingi verið siður í pørtum av Pakistan at revsa kvinnur við kynsligari misnýtslu, og mannarættindafelagsskapir hava leingi kravt, at myndugleikarnir í Islamabad skulu gera enda á áganginum, sum greitt stríðir ímóti landsins lógum.

Nú er líkt til, at tilburðurin í Meerwala kann bøta um rættindini hjá pakistansku kvinnunum.



# Danmark duldi upplýsingar fyri grønlendingum



*Høgni Hoydal heldur, at Føroyar og Grønland áttu at komið á listan hjá ST yvir lond við sjálvsavgerðarrætti, men sum enn ikki hava nýtt henda rættin*



*Jonathan Motzfeldt, landsstýrisformaður í Grønlandi, heldur, at tað var skeivt av donsku stjórnini at goyma týdningarmikil skjøl fyri grønlendingum. Hann heldur tað vera umráðandi, at grønlendingar fáa sjálvstýri innanfyri ríkisfelagsskapin*

**Tá danska grundlógin varð gjørd í 1953, skutu serfrøðingar upp, at Føroyar og Grønland skuldu hava grundlógartryggjaðan rætt til sjálvstýri. Hetta kom tó ongantíð við í grundlógina, og danska stjórnin duldi hesar upplýsingar fyri landsráðnum og villleiddi harvið grønlendingar**

POLITIKKUR
*Stefan í Skorini*

Danska blaðið Politiken avdúkar í grein, at danska stjórnin villleiddi grønlendska stýrið, tá landið í 1953 gjørdist partur av danska ríkinum og ikki longur hevði støðu sum hjáland. Hetta varð gjørt við at dylja sera týdningarmiklar upplýsingar fyri landsráðnum í Grønlandi.

Serfrøðingurin í statsrætti, Alf Ross, skeyt upp, at grundlógin skuldi tryggja Grønlandi og Føroyum rætt til sjálvstýri. Hesum tóku donsku myndugleikarnir tó ikki undir við, og hetta tilmælið mátti dyljast sum mansmorð.

Umsitingin við táverandi forsætisráðharra, Erik Eriksen úr Venste, á odda, var bangin fyri, at hetta fór at birta uppundir sjálvstýrishug grønlendinga og føroyinga, og tí skuldi hetta als ikki nevnast fyri grønlendingum.

Landshøvdingurin í Grønlandi, P.H. Lundsteen, sum eisini var formaður í Landsráðnum, fekk tó kunning um, hvussu málið í veruleikanum hekk saman, men hetta var í strongum trúnaði, skrivar Politiken.

## Fólkaatkvøða

Johan Lund Olsen úr flokkinum Inuit Ataqatiqiit, sum hoyrir heima á vinstravonginum, heldur, at hetta eigur at føra til, at tað grønlendska fólkið fær møguleika at taka støðu til sambandið við Danmark á eini fólkaatkvøðu. Hann leggur samstundis donsku stjørnina undir at hava villleitt landsráðið.

Grønlendski landsstýrisformaðurin, Jonathan Motzfeldt, er tó ikki so avgjørdur. Hann heldur, at tað var skeivt av donsku stjørnini at goyma umráðandi skjøl, tí hetta økir ikki um álitið millum londini. Hann vísir hinvegin á, at sambandið millum Grønland og Danmark ongantíð hevur verið opið sum millum tveir javnstillaðar partar.

– Tí er tað umráðandi, at vit fáa sjálvstýri, hóast vit eru ein partur av danska ríkinum, sigur landsstýrisformaðurin.

Hanne Petersen, professari í rættarsosiologi, heldur, at Grønland hevði verið komið nógv longri á sjálvstýrisleið, um Grønland hevði ein grundlógartryggjaðan rætt til sjálvstýri.

## Ikki í grundlógina

Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, heldur ikki, at tað hevði verið rætt, at givið Føroyum og Grønlandi ein grundlógartryggjaðan rætt til sjálvstýri.

– So hevði tað verið tað danska fólkið, ið hevði kunnað gjørt av, um Føroyar og Grønland skulu fáa sjálvstýri. Tað skal fólkið í báðum londunum sjálvandi gera av, sigur Høgni Hoydal.

Hann heldur, at Danmark skuldi sett Føroyar og Grønland á listan hjá ST yvir lond við sjálvsavgerðarrætti, men sum enn ikki hava útint henda rættin. Føroyar er ongantíð komið á henda listan, men vit skulu framvegis halda fast um sjálvsavgerðarrættin, heldur Høgni Hoydal. Um Føroyar koma á henda listan, kann landsstýrið samráðast við donsku stjórnina sum javnstillaður partur.

Sekstan lond standa í løtuni á hesum listanum hjá ST. USA hevur eitt nú sett Vesturindisku oyggjarnar á henda listan.

– Hetta vísir tó, at tess meira tú leitar í søguni, jú meira kemur tað fram, at Danmark hevur framt órætt móti Føroyum og Grønlandi. Vit hava ikki fingið tey rættindi, sum onnur lond í okkara støðu hava fingið, sigur Høgni Hoydal at enda.

# Hóraldur Joensen vardi ritgerðina

**Hóraldur Joensen úr Norðragøtu kann nú kalla seg dr.scient í kemi. Tað eydnaðist honum at verja doktararitgerðina, sum hann hevur skrivað um fitisýrur í fiski, við universitetið í Bergen**

DOKTARARITGERÐ
*Stefan í Skorini*



*Ein fegin Hóraldur Joensen eftir at hann hevði vart ritgerðina við universitetið í Bergen. Alt gekk væl, og hann kann nú kalla seg dr.scient í kemi*

Hóraldur vardi ritgerðina týsdagin, og hann hevði ein royndarfyrilestur mánadagin. Tað gekk sera væl, frætta vit úr Noregi. Hann fekk rós fyri eina væl úr hondum greidda ritgerð. Hon snýr seg um at skilja ímillum stovnar av fiski út frá fitisýrunum í gøgnunum, serliga hjartanum.

Kanningarnar hjá Hóraldi vísa stóran mun í nøgdunum av ymsu fitisýrunum í toski á Landgrunninum og á Føroyabanka. Somuleiðis vísir hon mun millum ymsu sløgini av kongafiski í landnyrðings Atlantshavi, og at fýra stovnar eru av trantkongafiski í sama øki. Hetta kann hava stóran týdning fyri framtíðar skipanina av fiskiskapinum eftir trantkongafiski og fyri býtið millum londini.

## Nýtast til eftirlit

Kanningarnar kunnu nýtast til at staðfesta, hvønn stovn fiskurin hoyrir til. Tað er t.d. komið fyri, at fiskiskip hava fiskað norðsjóvarsild, men hava landað hana sum norðhavssild. Við at nýta henda kanningarháttin ber til at vita við vissu, hvar sildin er fiskað, ella hvønn stovn hon hoyrir til, tí munur er á fitisýrunum í teimum ymsu fiskasløgunum. Kanningarnar kunnu sostatt nýtast til at hava eftirlit við fiskiskapi.

Ein av kanningunum, sum Fiskirannsóknarstovan og Hóraldur Joensen hava gjørt, var at hava tosk av landgrunninum og tosk av Føroyabanka í somu ringum í trý ár. Hesi bæði toskasløgini, sum stava frá ymiskum stovnum, livdu undir somu umstøðum og í sama umhvørvið í trý ár Tað vísti seg tó, at vit at kanna fitisýrurnar, bar til at staðfesta, hvar teir einstøku fiskarnir hoyrdu heima.

Opponentar undir verjuni av ritgerðini vóru skotin John Sergent, ið er professari í feittsýrubiologi, og Gunnar Nevdal, ið er professari í fiskaríbiologi.

Hóraldur Joensen hevur tey seinastu fýra árini verið knýttur at Fiskirannsóknarstovuni, og áðrenn tað var hann lærari á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum á Kambsdali.